Starvsleysing www.runavik.fo



# Sosialráðgevi

til Sosialu deild hjá Runavíkar kommunu

Eitt starv sum sosialráðgevi á Sosialu deild hjá Runavíkar Kommunu er leyst at søkja til setan 1. august 2005.

**Um Sosialu deild**

Sosiala Deild umsitur øll sosialmál, sum sambært lóg eru áløgd kommununi. Deildin virkar harumframt sum umsiting hjá ávarandi nevndum. Arbeiðsøkið umfatar m.a. barnaverndar-, dagstovna- og eldraøkið.

So hvørt sum fleiri málsøki verða flutt frá landsumsitingini til kommunurnar at umsita, verða fleiri uppgávur hjá Sosialu Deild at taka sær av. Frá 1. januar 2006 verður meginparturin av barnaverndarøkinum umsitið av kommununum.

**Starvið**

Tú kemur, í tøttum samstarvi við sosialdeildarleiðaran, at taka tær av einum spennandi og fjølbroyttum øki við málsviðgerð, ráðgeving og øðrum uppgávum, sum deildin tekur sær av. Eisini verður møguleiki til, frá byrjan at verða við til at uppbyggja deildina og arbeiðsgongdir á økinum.

**Arbeiðsuppgávan umfatar m.a.**

- at fyrireika mál til nevndarviðgerð
- at ráðgeva og vegleiða barna- og ungdómsfamiljum við serligum tørvi
- at ráðgeva barnaverndini í barnaforsorgarlógini
- at seta í verk og fylgja upp fyriskipanir
- at virka sum samskipari í málum har fleiri myndugleikar eru við
- at samstarva tvørfakliga
- aðrar málsviðgerðaruppgávur á deildini

**Vit leita eftir starvsfelaga, ið**

- er útbúgvin sosialráðgevi
- hevur royndir sum málsviðgeri
- hevur áhuga og evnir at arbeiða við barna og ungdómsfamiljum við serligum tørvi
- megnar at vera nágreiniligur og samstundis hava nógv annað um oyrani
- hevur gott yvirlit og dugir væl at orða seg

**Vit bjóða tær**

Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, har tú saman við leiðaranum hevur góðan møguleika at uppbyggja og menna Sosialu deildina frá grundini.

**Setanarviðurskifti**

Starvið, sum er fulltíðarstarv, verður sett skjótast gjørligt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Starvsmannafelagið

**Fleiri upplýsingar**

Fáast við at venda sær til Jákup H. Foldbo, sosialdeildarleiðara á Telefon 417000

**Søk starvið**

Við at senda okkum eina umsókn í seinasta lagið 11. mai 2005.

*Umsóknin skal sendast til:*

**Runavíkar Kommunu**
Heiðavegur 26
Postboks 139
FO-600 Saltangará

Runavíkar Kommuna
...ein kommuna í menning




*Um PEN-fløskkurnar eru penar, má lesarin gera av, men léttari at handfara eru tær so í øllum førum*
*Mynd: Bárður Lydersen*

# Gamalt øl á nýggjar fløskur

**Tað hevur loksins eydnast Føroya Bjór at fáa fatur á sonevndu PEN-fløskunum í vanligari støddi**

FLØSKUR
*Jákup Mørk*

Tað hevur tikið sína tíð, men nú ber so eisini til at keypa føroyskt øl í PEN-fløskum í vanligari støddi. Hetta er annars nakað, sum bara Carlsberg og Tuborg hava kunnað bjóða.

Føroya Bjór hevur annars í nøkur ár havt PEN-fløskur, men hesar hava verið í størra lagi og hava tí ikki fingið ta heilt stóru undirtøkuna millum manna. Eisini hava bæði Føroya Bjór og Restorff upp undir eitt nú ólavsøkuna tappað øl í PET-fløskur, men hesar eru ikki serliga væl egnaðar til øl, tí tær »anda«, og verður løðurin tí nakað deydligur, um fløskan stendur eina tíð.

Stóri trupulleikin hevur verið, at PEN-fløskurnar eru patenteraðar, og tí hevur ikki borið til hjá føroysku bryggjaríunum at fingið hendur á teimum.

Nú er hetta tó eydnast hjá Føroya Bjór, og fyrstu fløskurnar eru longu komnar á marknaðin. Í mun til vanligar øl er innihaldið nakað meira – 38 cl. móti 33 – men hóast tað, er fløskan munandi léttari.

Og ikki minst, so er talan her um eina fløsku, sum ikki letur glassplintrar eftir sær kring alt landið.

Pantið á nýggju fløskuni er 2,50 kr, og saman við økta innihaldinum ger hetta tí, at øl í PET-fløskum er dýrari enn í glas-fløskunum. Men roknað upp á liturin, er kostnaðurin altso hin sami.


Vælkomin á fiskivinnuframsýning á Sandvíkarhjalla í Tórshavn 3-5 mai 2005




THE FAROE ISLANDS
NORTH ATLANTIC FISH FAIR
INTERNATIONAL FISHING & AQUA CULTURE EXHIBITION

Faroe Ship · ATLANTIC AIRWAYS · FØROYA BANKI · Tórshavnar kommuna

petur & petur • www.petur.fo